## Februar

# Kyndil tók sær av báðum steypunum

### 1. februar
Í Vestmanna syrgir StÍF fyri, at hondbóltskappingni hjá monnum enn er púra opin. John Petersen skjýtur 15 av StÍF málunum í sigrinum á VÍF.

Finalan í steypakappingini hjá kvinnum verður millum VB og Kyndil, sum bæði vinna sínar dystir móti ávíkavist Neistanum og Stjørnuni.

Í fyrsta dystinum á árinum tapir A-landsliðið í fótbólti 1-0 móti finnlendingum. Sunvard Joensen spælir sín fyrsta landsdyst, tá hann kemur á vøllin í seinna hálvleiki.

Pól Thorsteinsson hevuyr skrivað undir sáttmála við barndómsfelagið, VB, eftir at hann í tvey ár hevur leikt við B36.

Í liðkappingini í talvi standa kollfirðingar seg óvæntað væl í Klaksvík. Hetta ber við sær, at Havnin nú tykist stevna beint móti FM-heitinum.




*Hondbólturin og Kyndil vóru sigursharrarnir, tá steypafinalurnar í hondbólti vórðu avgreiddar. Í tveimum spennandi og undirhaldandi dystum móti ávíkavist VB og Neistanum vinna bæði kvinnur og menn hjá yngra høvuðsstaðarfelagnum*

### 2. februar
Sámal og Sunvard Joensen úr GÍ eru fjórða brøðraparið, sum umboða Føroyar í altjóða skrásettum landsdysti.

Fleyr styrkir um oddastøðuni í meistaradeildini hjá monnum. Hjá kvinnunum tykist TB nú stevna beint móti silvurmerkjunum, eftir at tær vinna torføra útidystin á Giljanesi.

### 3. februar
Stjørnan fær hevnd fyri tapið í steypakappingini, tá tær vinna greiðan sigur á Kyndli í Havn. Við sigrinum tykjast klaksvíksgenturnar at hava tikið eitt avgerandi fet móti FM-gullinum.

### 4. februar
Hjá monnunum er Kyndil um at snáva móti KÍF, meðan StÍF vinnur greiðan sigur á Tjaldrinum.

### 5. februar
Lagt verður upp til finaludagin á Hálsi, har kvinnur og menn hjá Kyndli skulu dystast við ávíkavist VB og Neistan um heitið sum steypavinnarar í hondbólti.

Á la Manga tapir føroyska fótbóltslandsliðið 3-2 fyri Íslandi. Føroyar vóru annars eitt skifti á odda 2-0 við málum frá Kurt Mørkøre og Toda Jónsson.

### 8. februar
Steypadagurin gjørdist kyndilsdagur, tá Kyndil fekk sær ein dupultan á Hálsi. Í báðum førum var talan um sera spennandi dystir. Hjá kvinnunum hevði Kyndil eitt skifti greiða leiðslu, men at enda var bert eitt mál á muni. Hjá monnunum var Neistin á odda í 58 minuttir, men tá avtornaði var Kyndil omaná.

Oman á steypasigurin verður kyndilsleikarin, Janus Einar Sørensen úttikin til landsliðið.

HB hevur gjørt sáttmála við 24 ára gamlan rumenskan verjuleikara, sum skal spæla við liðnum komandi árið.

Í flogbóltskappingini nærkast avgerðin alsamt, og eingin tykist vera førur fyri at steðga monnunum hjá Fleyr og kvinnunum hjá Mjølni. Hinvegin er hørð kapping um silvurmerkini, har ávíkavist TB og Fram tykjast vera bestu boðini.

Gudrid Nolsøe skal saman við liðfeløgunum úr Fortuna spælið um DM-gullið í flogbólti.

Kollfirðingar skap aftur spenning í talvkappingina, tá teir vinda burtur úr oddaliðnum úr Havn. Munurin millum fremstu liðini er nú bert hálvt stig.

### 9. februar
Herman Hermansen vinnur kappingina í styrkilyfting, sum er í hølunum hjá Reyni Service í Hoyvík.

Leivur Holm breyt hondina í steypafinaluni, og verður helst ikki at síggja á vøllinum aftur hetta kappingarárið.

### 10. februar
Hóast tapið í steypafinaluni, so heldur Neistin fast um FM-vónina, tá teir vinna tryggan sigur á KÍF.

### 12. februar
Talvsambandið boðar frá, at teir í heyst fara at skipa fyri stórari talvkapping, har nakrir av heimsins fremstu telvarum fara at luttaka.

### 15. februar
Neistin vinnur toppdystin móti VÍF við einum máli, og hava nú av álvara lagt seg út í gullstríðið í bestu mansdeildini.

Í kvinnudeildini tykist VÍF hava sett kós móti silvurmerkjunum, nú tær hava vunnið torføra útidystin móti Neistanum. Neistin hevði annars nýggjan venjara í hesum dystinum. Christian Poulsen hevur tikið yvir eftir Rene Christensen.

Menninir hjá Mjølni tryggja sær sess í steypafinaluni, tá teir basa Fram í hálvfinaludystinum.

Kvinnurnar hjá Mjølni tryggja sær meistaraheitið í Flogbólti, tá tær vinna tryggan sigur á TB.

Bæði Bermuda og Liktinstein tykjast hava áhuga í at fáa venjingardystir móti føroyska landsliðnum.

Petur Mohr hevur gjørt sáttmála um at gerast venjari hjá ÍF í næstbestu fótbóltsdeildini.

FSF hevur gjørt av, at einasti undankappingardysturin á heimavølli í ár skal spælast á Svangaskarði. Tórsvøllur verður tó karmur um venjingardystin móti Danmark í summar.

### 16. februar
38 ára gamla Lone Hansen, sum er millum heimsins fremstu kvinnur innan karate vitjar Havnar Karatefelag.

### 17. februar
Skotska Ayr United við Jens Kristian Hansen á liðnum vinnur í steypakappingini á Dundee United, sum dagliga spælir í Premier League.

### 18. februar
Rúni Joensen, sum í fjør vardi málið hjá ÍF, tykist verða gíðslatikin í stríði millum ÍF og NSÍ um spæliloyvi hansara.

### 19. februar
Ruðuleiki tykist vera á Neistaliðnum. Kári Mortensen hevur boða frá, at hann vegna ónøgd um viðurskifti innan felagið ikki verður við á besta mansliðnum.

### 22. februar
Alt er komið í rættlag aftur í Neistanum, og Kári Mortensen telist millum høvuðsleikararnar, tá 1. lið vinnar á føroyameistarunum av Strondum.

Stjørnan nærkast alsamt gullinum, og hóast tað enn eru fimm umfør eftir av kappingini, so tykist alt longu at vera avgjørt.

Torleif Sigurðsson hóttir við at leggja frá sær sum formaður, tá aðalfundurin hjá FSF ikki vil góðtaka, at sersambandið keypur bygningin á Tórsvølli. Eftir nýggja atkvøðugreiðslu verður keypið tó samtykt.

Fleyr hevur tryggjað sær FM-hjá monnum í flogbólti.

Spenningurin í talvkappingini er framvegis stórur. Havnin og Klaksvíkin liggja lið um lið í oddinum.

Aðalfundurin hjá FSF samtykkjur nýggjar reglur fyri leikaraskifti, soleiðis at reglurnar fyri føroyskar og útlendskar leikarar eru einsljóðandi.

### 23. februar
Pól Thorsteinsson og Henning Jarnskor fara til Íslands, har Valur hevur boðið teimum til royndarvenjingar.

### 24. februar
Dráttur vinnur í hálvfinaluni á Fleyr, og tryggjar sær harvið finalusessin. Í finaluni skal Dráttur spæla móti Mjølni, sum longu hevur tryggjað sær FM-heitið.

Alt tykist avgjørt í hondbóltskappingini hjá kvinnum, eftir at Stjørnan vann tryggan sigur á Kyndli.

### 25. februar
ÍSB hevur gjørt sponsorsáttmála við Føroya Lívstrygging.

John Heri Dam hevur gjørt sáttmála við Jotun íi triðbestu norsku deildini, har Kári Reynehim er venjari.

VÍF tekur sær av løttum í bestu mansdeildini, tá teir vinna tryggan sigur á H71.

### 29. februar
Stjørnan vinnur heimadystin á VB, og við úrslitinum eru tær so at siga vísar í at vinna FM-heitið. Hjá monnunum vinna øll oddaliðini sínar dystir, so er spenningurin eins stórur.

Ayr United og Jens Kristian Hansen vinna annað vikuskiftið á rað móti liði úr bestu skotsku deildini, og hava nú vunnið seg fram til fjórðingsfinaluna í steypakappingini.



## Mars

# Mansliðið fekk væleydnaðan elddóp

### 1. mars
15 ára gamli gotudrongurin, Kenneth Danielsen, sum kappast á motor-cross í Danmark, vinnur fyrstu kapping sína í 125 ccm bólkinum.

### 2. mars
Jens Martin Knudsen og Jens Kristian Hansen spæla samfullar 90 minuttir, tá Ayr United tpair 1-0 í næstbestu skotsku deildini.

### 3. mars
Neistin skrivar søgu, tá teir fyri fyrstu ferð megna at vinna samfullar fýra landskappingardystir móti grannunum úr Kyndli í einum sama kappingarári. Samstundis vinnur VÍF sannførandi á KÍF, og gullstríðið líkist nú einum dysti millum hesi bæði.

Hjá kvinnunum vinnur Neistin á Kyndli, og eru tær bláu nú av álvara við í stríðnum um silvurmerkini.

### 4. mars
Jens Kristian Hansen boðar frá, at hann fer aftur til B36, nú leigumálið við Ayr United rennur út.




*Føroyska manslandsliðið í hondbólti verður at kalla endurføtt, og eftir tveir sigrar og einum javnleiki móti Grønlandi tykist breið semja vera um, at tilfarið í liðnum er gott*

### 7. mars
Nýggja føroyska A-landsliðið í hondbólti fekk sín elddóp, tá Grønland vitjaði um vikuskiftið. Tríggir dystir vórðu leiktir, og vunnu okkara menn teir báðar fyrstu, meðan triði dysturin endar við javnleiki. Eftirmetingin boðar frá, at Føroyar aftur kunnu rokna við, at fáa nakrar undirhaldandi landsdystir frá monnunum.

Stórkapping í fimleiki var um vikuskiftið, og vann Ljósið tvær av teimum trimum kappingunum, sum vóru á skránni.

Flogbóltskappingin snýr seg nú mest um silvurdystin, og her missur Fram eitt týdningarmikið stig, tá teir tapa fyri Fleyr.

Liðið Havnar Talvfelag vinnur FM fyri lið. Bert hálvt stig skilti teir frá klaksvíkingum. Bæði liðini vunnu 4-0 í seinasta umfarinum.

Á 30 ára veitsluni hjá talvfelagnum verða Hans Petersen og Jákup Thomsen kosnir til heiðurslimir.

### 8. mars
Steypakappingin hjá yngru deildunum í hondbólti er avgreidd um vikuskiftið.

### 9. mars
Heidi Andreasen og Esther Gaard Hansen fara til Greve í Danmark, har tær skulu kappast í NM í svimjing fyri rørslutarnað.

### 10. mars
Nestin vinnur á H71, og hevur framvegis fult stigatal í endaspælinum hjá monnum.

Danska superligan er um at fara í gongd, og millum annað er stórur spenningur um, hvørt Herfølge megnar at halda sætið í oddinum.

### 11. mars
Judolandsliðið fyri ungdómsdeildirnar er úttikið. Fyrsta uppgávan verður ein altjóða kapping í apríl mánaði.

### 14. mars
VÍF vinnur klassiska mansdystin móti Kyndli, og heldur harvið fast um oddasessin í bestu mansdeildini. Hinir báðir FM biðlarnir, Neistin og StÍF halda tó eisini fast, so enn er einki avgjørt.

Hjá kvinnunum tryggjar Stjørnan sær endaliga FM-heitið, sum tó hevur tókst trygt í nakrar vikur. Tær tapa tó heldur óvæntað dystin í Havn móti Neistanum, men tá Kyndil samstundis tekur stig frá VÍF, er alt avgjørt.

Seinasta leikumfar er í flogbóltskappingini, og so fáa Fleyr-menninir og Mjølnir-kvinnurnar steypini, sum tey leingi hava verið vís í at fáa.

Herfølge fær – uttan at spæla – eina ynskisbyrjan upp á endaspurtin í donsku superliguni, tá Brøndby púra óvæntað tapir fyri Esbjerg.

Í NM í svimjing vinnur Esther Gaard Hansen tvey silvurmerki og eitt bronsumerki.

### 15. mars
Herfølge tapir fyri Lyngby í donsku superliguni.

### 16. mars
Kvinnuliðið hjá Stjørnuni, sum longu hevur tryggjað sær FM, vinnur greitt á VÍF, sum nú er í vanda fyri at missa møguleikan fyri heiðursmerkjum.

B36 fær um vikuskiftið vitjan av einum norðmanni og einum íslendingi, sum møguliga skulu styrkja um liðið komandi kappingarár.

### 17. mars
Sveinbjørn Dánialsson og Karl Vidtfeldt eru valdir til kappingarstjórar hjá FSF fyri ávíkavist kvinnu- og ungdómsdeildirnar.

### 18. mars
Tað røkist fyri einum spennandi ítróttavikuskifti. Í hondbóltinum nærkast avgerðin í bestu mansdeildini, í donsku superliguni skal Herfølge spæla móti Brøndby og ikki at gloyma verða steypafinalurnar í flogbólti avgreiddar um vikuskiftið.

### 21. mars
Steypafinalurnar í flogbólti eru avgreiddar, og meðan kvinnurnar hjá Mjølni vinna væntaða sigurin á Drátti, gera menninir úr Klaksvík heldur óvæntað kvinnunum kynstrið eftir, tá teir vinna á meistarunum úr Fleyr.

StÍF er sett uttan fyri í stríðnum um gullmerkini hjá monnum. Neistin vinnur dystin á Skála, og hevur framvegis fult stigatal. StÍF var annars á odda 23-20, men endaliga úrslitið gjørdist 23-24.

Hjá kvinnunum tykist Neistin nú at vera ávegis móti silvurmerkjunum. Hinvegin tykist VÍF at hava mist alt, nú tær máttu lúta fyri VB.

Herfølge tapir oddadystin móti Brøndby við tveimum málum móti ongum.

Talvsambandið hevur gjørt av, at FM fyri einstaklingar skal haldast á Oyrarbakka í døgunum 15.-22. apríl.

### 22. mars
Felagið fyri fótbóltsdómarar hevur havt aðalfund og harumframt var eisini skeið fyriskipað.

### 23. mars
KÍ hevur skrivað undir sáttmála við Statoil, sum við hesum verður høvuðsstuðul felagsins.

Liðkappingin í Judo er liðug, og bæði í dreingja- og unglingadeildini gjørdist Sunda Judofelag vinnari.

### 25. mars
Heðin Mortensen er ikki í iva um, at Býráðið eigur at yvirtaka Tórsvøll, so vøllurin kann gerast liðugur sum skjótast.

### 28. mars
Eingin avgerð fellur í manshondbóltinum fyrr enn á seinasta leikdegi. Hetta gerst greitt, tá VÍF vinnur tryggan sigur á Skála. Hjá kvinnunum tryggjar Neistin sær silvurmerkini, meðan Kyndil vinnur bronsu, so har er alt avgjørt undan seinasta leikdegi.

H71 boðar frá, at teir aftur í ár fara at skipa fyri stórari gallaveistlu, tá hondbóltskappingin er av.

Bólkaspælið í kappingini um løgmanssteypið er farið í gongd, og mest óvæntaða úrslitið er helst, at ÍF vinnur heimadystin móti B36. Eisini í Runavík er tað óvæntað, at Sumba skal vinna 1-0.

Í donsku superliguni er Herfølge fimm stig framman fyri nummar tvey, eftir at teir vunnu útidystin móti AGF.

### 29. mars
Træta er aftur um, hvørt Tórsvøllur skal hava rennibreyt ella ikki. Býráðið sigur tað vera ein spurning um raðfesting av kommunalu krónunum. Poul Michelsen, formaður í Tórsvallargrunninum, sigur seg bert vilja hava arbeiðsfrið og ein greiðan arbeiðssetning.

### 30. mars
Johan Byrial Hansen, sum er hálvur føroyingur, búsitandi í Odense, skrivar undir sáttmála við superligufelagið, OB.

Jens Kristian Eldevig sum hevur verið á grønlendska landsliðnum, venur við GÍ.

Guttorm Sørensen og Rigmor N. Joensen vinna fyrstu rennikappingina á árinum.

Sóljan hevur tryggjað sær uppflyting til bestu kvinnudeildina i hondbólti.

### 31. mars
Í týdningarleysum dysti staðfestir StÍF triðja plássið, tá teir vinna seinasta dystin móti Kyndli.

Pól Thorsteinsson hevur skrivað undir sáttmála við íslendska felagið, Valur, har hann skal spæla komandi árið. Enn er ikki greitt, um hann fær Henning Jarnskor sum liðfelaga.